


www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 04 - 2013

# Itacha keypir Valiant við loyvi í Føroyum

Bretska oljufelagið Valiant Petroleum, sum í fleiri ár hevur verið partur av oljuleitingini á føroyska landgrunninum, er vorðið uppkeypt av oljufelagnum Ithaca Energy. Keypið varð staðfest í gjár. Hyggja vit við føroyskum eygum eftir Valiant, so keypti felagið í síni tíð eitt annað lítið oljufelag, sum hevði leitiloyvi í Føroyum. Tað var Sagex Petroleum. Nú er so túrurin komin til Itacha Energy, ið eisini er eitt av teimum smærri oljufeløgunum á altjóða pallinum. Hvørja avleiðing uppkeypið fær fyri virksemið í Føroyum er ilt at meta um. Valiant hevur í fleiri ár staðið fyri ikki færri enn trimum leitiloyvum í Føroyum, harav tveimum saman við Atlantic Petroleum. Í fjør lat felagið so inn aftur til føroysku myndugleikarnar, Jarðfeingi, eitt av loyvunum, og fyrr í ár lat Valiant Petroleum inn aftur enn eitt av sínum loyvum. Í dag stendur Itacha, sum hevur keypt Valiant so fyri einum leitiloyvi í Føroyum saman við Atlantic Petroleum. Tá oljufeløg lata inn aftur loyvi merkir tað vanliga, at tey eru komin hartil í síni arbeiðsskrá, at tey skulu taka avgerð um, antin tey vilja bora ein brunn ella gevast, tað, sum á oljumáli verður nevnt drill or drop. Støðan á føroyska landgrunninum í dag er tann, at Statoil stendur fyri fimm av leitiloyvunum og Itacha fyri einum. Sum skilst er tíðin komin hartil, at Valiant/Itacha skal taka støðu til, um tað vil bora ella heldur gevast í Føroyum. Meira verður helst at frætta um tað í næstum.